## Sandoyingur til AB



19 ára gamli Rasmus Nielsen skal í komandi kappingarári spæla við AB. Tað skrivar heimasíðan hjá felagnum.
Rasmus Nielsen hevur seinnu árini spælt við barndómsfelagnum B71. Men nú sandoyingar skulu spæla í næstbestu deildini, velur hann at royna seg á Argjum. - Vit hava stórar vónir til hansara. Vit eru sera spentir at fáa hann út á Argir, sigur Sjúrður Olsen, næstformaður í nýstovnaða FC Argir, við heimasíðuna.
Rasmus Nielsen er framrættaður miðvallari.

## Skála sett tríggjar venjarar

Skála brynjar seg nú til kappingarár í næstbestu deildini. Frágongdin hevur verið stór í felagnum í vetur, og nú er greitt, hvør kemur at standa á odda fyri skerda liðnum. Alexandur Johansen, Bárður Danielsen og Hans Jákup Andreasen hava allir tikið av tilboðnum at standa fyri venjingunum hjá 1. deild, 3. deild og unglingum í komandi kappingarári. Tað skrivar heimasíðan hjá Skála. Hetta er fyrstu ferð, at Alexandur Johansen og Bárður Danielsen royna seg í venjarastarvinum.

# Annika Vang klár til HM

**Í einari kapping, har úrslitini lógu undir miðal, var ein skjútti, ið megnaði meira enn hini. Annika Vang skeyt nevniliga 551 stig, og hetta er oman fyri kravið bogaskjótideildin hevur sett til kvinnur recurve til at luttaka í HM. Tó vann Torfinn Hansen recurvekappingina, tá hann megnaði at gera júst nóg mikið, tá hann mátti. Í compound setti ungi Magnus Andreassen støðið**



*Annika Vang hevði ein fínan dag á Eiði um vikuskiftið, og longu nú hevur hon skotið betur enn tað, sum verður kravt, um hon skal fáa loyvi at fara til HM, sum verður í Póllandi í mars mánaði*

**BOGASKJÓTING**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast úrslitini sum heild lógu í lakara endanum, so skaraði Annika Vang framúr, og skeyt seg til innandura heimsmeistarakappingina, um hon leggur í at fara.

Sjálv ivast Annika Vang eitt sindur, um hon skal fara, tí hon setir sum krav til seg sjálva, at hon skal halda sær á verandi støðið ella betra seg.

Kappingin verður í Rzeszow í Póllandi fyrstu viku í mars mánaði.

Í recurve kappingini luttóku níggju skjúttar, og í compound luttóku átta skjúttar

### Recurve

Innleiðandi var tað, at Annika Vang kláraði seg ótrúliga væl við 551 stigum, av 600 møguligum. Absalon Hansen royndi við sínum 534 stigum at hanga í, meðan hini skjúttarnir lógu frá 506 stigum og niður á 389 stig. So spjaðingin var stór.

Í fjórðingsfinalunum vóru tveir rímiliga spennandi dystir, meðan hinir dystirnir vóru vunnir ruddiliga av favorittinum, sum var styrkismettur hægri.

Feðgarnir, Fríði og Jógvan Magnus Andreasen skutu ímóti hvørjum øðrum, og dysturin var rímiliga spennandi, líka til seinasta umfar, tá Fríði Andreasen ikki longur lat pápan sita í pínubonkinum, og smekkaði ein píl langt út í síðuna. Sostatt vann Jógvan Magnus dystin við 96 stigum ímóti 92 hjá soninum.

Torfinn Hansen og Eirikur í Jákupsstovu skutu eisini ein spennandi dyst. Eirikur í Jákupsstovu legði seg á odda, men Torfinn Hansen háláði inn á restina av tíðini, og at enda gjørdist munurin trý stig, sum Torfinn Hansen vann við. Úrslitið gjørdist 102-99.

### Hálvfinalur

Í hálvfinalunum skuldu Torfinn Hansen og Annika Vang møtast. Samstundis sum Jógvan Magnus Andreasen og Absalon Hansen skuldu skjóta hina hálvfinaluna.

Annika Vang mátti við síni góðu skjóting innleiðandi metast sum favorittur, men Torfinn Hansen var nú farin at skjóta heil væl, og vann sostatt við tveimum stigum ímóti Anniku Vang.

Millum Absalon Hansen og Jógvan Magnus Andreasen gjørdist dysturin ongantíð veruliga spennandi, og úrslitið gjørdist, at Absalon vann við heili átta stigum.

### Finalur

Bronsufinalan bleiv sostatt ímillum Jógvan Magnus Andreasen og Anniku Vang. Annika Vang tók seg nú saman, og skeyt 112 stig av 120 møguligum. Tá støðið bleiv so høgt megnaði Jógvan Magnus Andreasen als ikki at fylgja við, tí hann fekk bert 91 stig.

Tað verður leingi at leita eftir einari veikari finalu í bogskjóting í Føroyum enn tí í gjár. Absalon Hansen gjørdi ikki mætari enn at skjóta tveir pílar, ið bert góvu eitt stig, meðan Torfinn Hansen heldur ikki gjørdi nógv av. Úrslitið gjørdist, at Torfinn Hansen vann við einum stigið, tá hann fekk 89 stig. Absalon Hansen er helst ikki nøgdur við síni 88 stig í gjár.

Sostatt kann mann róliga siga, at Torfinn Hansen hevði uppiborið at vinna í gjár, tá hann hvørja ferð megnaði at gera júst nóg nógv til at vinna.

### Compound

Í bólkinum við comound skjúttunum gjørdist tað heilt javnt innleiðandi, og bara seks stig vóru ímillum nummar eitt og nummar fýra. Jógvan Niclasen lás sum so ofta fremstur. Hann hevði 563 stig, sum er heldur lægri enn hann plagar at skjóta.

Í kvarfinalunum vóru fleiri spennandi dystir, og serliga dysturin ímillum Kaj Johannesen og Nikkel Petersen gjørdist tað heilt spennandi. Bert eitt stig skilti skjúttarnar, og endin varð, at Kaj Johannesen dró longra stráið og vann við einum stigið.

Hinar dystirnar vann tann, ið lá fremstur innleiðandi.

### Hálvfinalurnar

Í hálvfinalunum gjørdist tað ikki líka spennandi, sum tað ofta hevur verið, tí Jógvan Niclasen vann við ikki færri enn níggju stigum ímóti Kaj Johannesen.

Í hinari hálvfinaluni gjørdi ungi Magnus Andreassen ein vørr, og megnaði at vinna ímóti, veteraninum Per H. Andersen, við trimum stigum.

### Finalur

Bronsudysturin gjørdist heilt spennandi, og Kaj Johannesen megnaði at vinna á Per H. Andersen. Sjálvur dysturin endaði 110-110, sum er rættiliga góð skjóting. Hetta merkti at umskjóting skuldi til, og við fyrsta pílinum fingu báðir níggju, so ein pílur afturat skuldi til. Tá hevði Kaj Johannesen teir róligaru nervarnar og skeyt í miðjuna, og fekk sostatt tíggju stig. Tað megnaði Per H. Andersen ikki, tí hann fekk bert níggju stig fyri sín píl.

Í finaluni skutu Magnus Andreassen og Jógvan Niclassen. Hesin dysturin gjørdist bæði spennandi og góður. Endin gjørdist, at Magnus Andreassen var púra kaldur og megnaði at skjóta 114 stig. Tá Jógvan fekk 113 stig, sum ikki er so lítið, so var hetta ikki nóg mikið. Sostatt megnaði 16 ára gamli Magnus Andreassen, sum enn ikki veruliga hevur aldur at skjóta millum tey vaksnu, at vinna fyrstu bogaskjótikappingina á Eiði nakrantíð.

Skjúttarnir vóru sum heild ikki so nøgdir við sína egnu skjóting, men onkur góð úrslit vóru tó í ítróttarhøllini á Eiði í gjár.

## Finalisturin verður funnin á Eiði

**Í kvøld klokkan 20.30 skulu kvinnurnar hjá Drátti og Fleyr gera av, hvør teirra skal spæla steypafinalu móti SÍ**

**FLOGBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Neyðugt er við eini eyka hálvfinalu millum liðini, eftir at Fleyr vann finaluna í Mjølnir-kappingini. Dráttur hevði undan hesum vunnið Fleyr-kappingina, og tí stóð á jøvnum í dystinum um at vissa sær sæti í steypafinaluni.**

**Hitt plássið í finaluni eigur SÍ, sum var fremsta liðið, tá fyrsti triðingurin av landskappingini var lagdur aftur um bak.**

**Og alt bendir á ein spennandi dyst í kvøld. Í landskappingini hava liðini vunnu hvør sín dyst ímóti hvørjum øðrum.**

**Og so verður talan eisini um gott høvi hjá Eiðisfólki at síggja toppflogbólt í nýggju ítróttarhøllini. Ásetingarnar hjá FBF áseta, at ein møguligur eyka hálvfinaludystur skal spælast á uttanveltaðum vølli, og tí varð hildið skilagott at leggja hendan á Eiði, har flogbóltstraditiónirnar enn ikki eru so stórar, men har møguleikarnir eru sera stórir, nú Ítróttarhøll er komin til bygdina.**